**Reglugerð fyri Ráð teirra lesandi á Fróðskaparsetri Føroya**

Endamálið hjá Ráði teirra lesandi er at umboða øll lesandi á Fróðskaparsetri Føroya. Aðalmálið er at røkja áhugamál teirra lesandi í samstarvi við setursleiðslu, undirvísarar og onnur starvsfólk á stovninum.

**§ 1 Ráð teirra lesandi**
Tey lesandi á Fróðskaparsetri Føroya (Setrinum) kunnu velja at skipa seg í eitt Ráð teirra lesandi (RTL) sambært avtalu við leiðsluna á Setrinum.

2. stk. Í RTL verður valt eitt umboð og eitt varaumboð frá hvørjari deild. Deildirnar eru ávikavist:
Føroyamálsdeildin (FMD)
Námsvísindadeildin (NÁD)
Náttúruvísindadeildin (NVD)
Sjúkrarøktarfrøðideildin (SRFS)
Søgu- og samfelagsdeildin (SSD)

3. stk. Harafturat er umboð fyri tey lesandi í stýrinum fyri Fróðskaparsetur Føroya sjálvskrivað limur í RTL. Um eingin frá deildini hjá stýrisliminum er í RTL, hevur stýrislimurin atkvøðurætt. Um ein frá hennara/hansara deild er limur í RTL er stýrislimurin við sum eygleiðari.

4. stk. Ráðið er viðtøkuført tá í minsta lagi 3 umboð eru við á fundi.

5. stk. Studentavegleiðarar á deildunum kunnu ikki verða umboð í Ráðnum.

6. stk. Umframt RTL kunnu lesandi á deildunum skipa ráð fyri hvør sína deild í samráð við umsitingina á deildunum og RTL.

**§2 Val av Ráði**
Hvør av nevndu deildunum í §1 stk. 2 velur í september á hvørjum ári ein lesandi sum umboð í RTL. Um so er, at fleiri lesandi á somu deild ynskja at umboða tey lesandi á deildini skal deildarumsitingin skipa fyri vali millum tey lesandi. Tann fyrst valdi lesandi gerst limur í RTL og næst valdi gerst tiltakslimur.

2. stk. Øll fulltíðarlesandi á Setrinum hava valrætt og valbæri til RTL.

3. stk. Ráðið skipar seg sjálvt við formanni/ -kvinnu, varaformanni/ -kvinnu, skrivara og kassameistara.

4. stk. Um Ráðið heldur tað verða neyðugt, kann tað seta arbeiðsbólkar at taka sær av serligum málum. Lesandi kunnu somuleiðis heita á Ráðið um at seta í verk ymsar arbeiðsbólkar.

**§ 3 Ráðsfundir**
Regluligir fundir eiga at verða hildnir eina ferð um mánaðin, meðan undirvísing er. Tó í minsta lagi 4 ferð um árið. Fundartíðirnar verða kunngjørdar teimum lesandi við byrjan av lestrarárinum.

1. stk. Formaðurin/forkvinnan ger fundarskrá, og skal skráin sendast ráðslimum við telduposti í seinasta lagi tveir dagar fyri fundin.

2. stk. Ráðslimirnir kunnu koma við uppskotum til dagsskrá, áðrenn hon verður kunngjørd. Lesandi kunnu heita á ráðið um at taka upp mál til viðgerðar.

3. stk. Formaðurin/-kvinnan kann harafturat boða til fundar, tá hann/hon heldur tað vera neyðugt, og um leiðslan á Setrinum ella tveir limir í RTL biðja um tað. Formaðurin/-kvinnan skal tá munnliga boða ráðslimunum frá í seinasta lagi dagin fyri, at fundurin verður.

4. stk. Ráðið kann eisini bjóða øðrum enn limunum á fund og lesandi kunnu heita á Ráðið um luttøku á fundinum.

5. stk. Limir Ráðsins hava skyldu at møta á ráðsfundum. Hevur limur forfall, skal hann boða formanninum/-kvinnuni frá og biðja møguligan tiltakslim møta fyri seg. Ráðslimur, ið ikki hevur verið á fundi, eigur at gera seg kunnugan við fundarfrásøgnina.

6. stk. Í byrjanini av hvørjum skúlaári verður hildin ein kunningarfundur fyri øllum lesandi á Setrinum. Á skránni er:

1. Frágreiðing frá farna ári.
2. Uppskot til broytingar at leggja fyri leiðsluna.
3. Innkomin mál.
4. Ymiskt.

**§ 4 Gerðabók**
Skrivarin skrivar fundarfrásøgn frá hvørjum fundi, og skrásetir hana í gerðabókina. Skipanin av RTL og fundarskipan eiga fyri hvørt skúlaár at verða skrásett í gerðabókini. Fundarskrá, høvuðstættir í málsviðgerðum, niðurstøður Ráðsins og minnilutaummæli skulu verða skrivað í gerðabókina. Hevur atkvøðugreiðsla verið, skal verða greitt frá evninum, ið atkvøtt er um, og úrslitinum av atkvøðugreiðsluni (hvussu nógv atkvøddu ávikavist ja, nei ella blankt).

2. stk. Gerðabókin verður lisin fyrst á hvørjum fundi. Formaður/-kvinna og skrivari vátta fundarfrásøgnina.

3. stk. Formaðurin/-kvinnan hevur ábyrgdina av, at gerðabókin verður alment atkomilig, sambært mannagongdum á Setrinum.

**§ 5 Arbeiðsøki**
Ráðið skal verða kunnað um og fáa høvi at siga Setursleiðsluni og Akademiska ráðnum sína hugsan um hesi mál, áðrenn tey verða avgreidd:

Viðurskifti, ið verða mett at viðkoma ella ávirka tey lesandi á Setrinum, t.d.
1. Meginreglur at taka upp lesandi.
2. Lærugreina- og tímabýtið fyri hvørt undirvísingarár.
3. Broyting og innrætting og nýgerð av rúmum.
4. Undirvísingarspurningar.

5. Felagstiltøk á deildunum og Setrinum sum heild.
6. Ætlanir við royndarundirvísing.

2. stk. Ráðið kann seta fram uppskot um evni til felagsmentanarlig tiltøk á Setrinum.

3. stk. Ráðið hevur skyldu til at viðgera mál, sum setursleiðslan ella undirvísingarleiðslan biður tað ummæla. Ráðið kann eisini viðgera mál, ið hava almennan týdning fyri Setrið. Ráðið hevur skyldu at viðgera mál lesandi seta fram.

4. stk. Avgerðir, tilmæli og ummæli ráðsins skulu altíð verða fráboðað lesandi og starvsfólkum.

5. stk. Ráðið hevur heimild at samráðast við Setursleiðsluna um spurningar, ið:
1. Viðvíkja lestrarumstøður og trivnað teirra lesandi.
2. Nema við vandamál viðvíkjandi útbúgving ella viðurskiftum hjá lesandi.

6. stk. Er ósemja um eitt mál og ikki ber til at loysa ósemjuna við samráðing ímillum Ráðið og Setursleiðsluna/Akademiska ráðið, kann málið leggjast fyri Stýrið fyri Fróðskaparsetur Føroya. Málið verður sent í heilum líki, umvegis rektaran og við viðmerkingum hansara, sum RTL eisini fær. Ummæli Ráðsins eigur at verða sent við, tá ið málið verður lagt fyri Stýrið.

7. stk. Ráð teirra lesandi hevur hvørki rætt ella skyldu til at siga sína áskoðan um viðurskifti hjá tí einstaka lesandi. Ráðið tekur tískil ikki upp persónsmál.

**§ 6 Útreiðslur**
Setrið kann stuðla tiltøkum eftir umsókn.

2. stk. Fyri luttøku á ráðsfundi verður hvør limur í RTL løntur við kr. 250,-. Ráðslimir kunnu fáa váttan, um at viðkomandi hevur verið limur í ráðnum í minsta lagi eitt lestrarár.

3. stk. Setursskrivstovan hjálpir Ráðnum at skipa skrivstovuhald.

Soleiðis viðtikið av Setursleiðsluni.

Hendan reglugerð kemur í gildi beinanvegin.

21. juni 2013
Fróðskaparsetur Føroya

B. Gaard
Birna Gaard
*Umboð teirra lesandi í stýrinum fyri Fróðskaparsetur Føroya*

Sigurð í Jákupsstovu
Sigurð í Jákupsstovu
*Rektari fyri Fróðskaparsetur Føroya*